# Ferðafrásøgn Slovenia. 7-19/11-2012.



Vit báðir Janus Skaale og eg sjálvur Hans Hjalti Skaale vóru í døgunum 6-19/11 -2012 til Heimsmeistara kapping í talvi fyri børn í Maribor í Slovenia. World Youth Chess Championships 2012. Heimasíðan til kappingina er: http://www.wycc2012.com/

Hetta er ikki smávegis avbjóðing fyri ungan føroyskan telvara, og so vítt vit vita, er Janus fyrsti føroyingur sum luttekur í hesi kapping nakrantíð, so tað er ikki sørt at virðingarótti er á monnum - kanska serliga pápanum - tá ið avgerð verður tikin, saman við forseta talvsambandsins Finnbjørn Vang, um at melda Janus til. Ikki tí, Janus hevur ikki heilt ongar royndir á teimum 64 puntunum.

Janus er tvey tey undanfarnu árini vorðin Føroyameistari í sínum aldursbólki 4. flokkur og yngri, og hevur staðið seg væl til NM, (seinast nr. 4 við 3,5 stig av 6) Hann hevur, hóast sín unga aldur, longu luttikið í Norðurlendsku Meistaraheitunum 4. ferð. Janus er 11 ára gamal og skal í Slovenia luttaka í bólkinum U12 Open. Kappingin er skipað í 6 aldursbólkar: Ein Open og ein bólkur fyri gentur í hvørjum aldursbólki:

**Aldursbólkur undir 08** : Føðiár 2004 og seinri.

**Aldursbólkur undir 10** : Føðiár 2002 og seinri.

**Aldursbólkur undir 12** : Føðiár 2000 og seinri.

**Aldursbólkur undir 14** : Føðiár 1998 og seinri.

**Aldursbólkur undir 16** : Føðiár 1996 og seinri.

**Aldursbólkur undir 18** : Føðiár 1994 og seinri.

Janus er føddur í 2001 og er hetta sostatt fyrra árið hann kann luttaka í U12. Farið var avstað við góðum treysti, og eg skal her niðanfyri greiða frá ferðini:

Orsaka av avboðstrygging og óstøðum flogviðurskiftum, bleiv okkum rátt til, at vit skuldu flúgva niður til Keypmannahavnar ein dag frammanundan víðari ferð, og so var gjørt. Vit settust í "nýggja bussin" vesturi í Vágum tá klokkan var blivin átta, og tveir tímar seinri spákaðu vit eftir kilometur longu bonaðu gólvunum í Kastrup. Vit høvdu funnið okkum innivist hjá skyldkonu sum lesur í København, so vit leitaðu okkum út á Solbakken Kollegiet, har vit skuldu gista hesa fyrstu náttina á ferð okkara.

Tey eru trý fólk í húsi, maður kona og barn. Tá vit komu á gátt var støðan í húsinum ikki góð, har herjaði hervilig búksótt, og fyrsta vit upplivdu úr stovuni var, at maðurin í húsinum sum var seingjarliggjandi, spýði út á gólvið í lítla kollegie kamarinum. So har var eitt at gera, at halda á dyr sum skjótast, so telvarin ikki dró sóttina uppá seg og gekk fyri, áðrenn fyrsti leikur var fluttur.

Ein dagur í Keypmannahavn gongur tó skjótt, Janus hevur inspirerandi lærara í Náttúru og tøkni, so hann er í seinastuni vorðin hugtikin av stjørnuhimmalinum, serliga av hinum gongustjørnunum í okkara sólarskipan. So her var einki meiri upplagt, enn at fara ein túr á Tycho Brahe Planetarium har vit hugdu eftir áhugaverdari framsýning og ordiligum 3D filmi um veðrið á hinum planetunum. Tá filmurin varð liðugur, vóru vit samdir um, at best var hóast alt, at vit vóru staddir her á okkara “friðarligu” bláu planet, hóast tað kann regna nokkso illa í Klaksvík viðhvørt. Danir eru kendir fyri at gera góðar pylsur og Janus Bóndi alias James Bond var eisini í býnum, og tá hann hevði bjargað heiminum, var songartíð so vit fóru heim og krupu undir fjaðrarnar.




Snimma morgunin eftir kl. 07.10 fór flogfar okkara úr Kastrup við kós móti Vienna, sum er høvuðsstaður í Eysturríki. Vit umhugsaðu fleiri fer at fortelja, at vit kendu væl Torkil Nielsen, men orsaka av møguligum óhugaligum avleiðingum lótu vit vera. Hiðani frá fóru vit í eitt minnið propell flogfar, sum larmaði øgiliga illa, og flugu til Graz. Hetta var bert ein stuttur túrur uppá einar 40 min. Tá vit komu út, stóðu tvær vinarligar konur fyri okkum við skiltum við áskriftini WYCC 2012, so hetta gekk sum fótur í hosu. Vit blivu leiddir út í “The big blue bus” og væntaðu ikki at hetta fór at vera nakar drúgvur túrur. Heimanífrá høvdu vit lisið okkum til, at úr Graz til Maribor vóru bert 45 kilometrar, men vit fingu annað at síggja.
Bussurin er fullur av fólki, og longu nú uppliva vit, at hetta er ein international talvkapping, tí øgilig málageipan av mongum heimsins tungumálum hoyrist. Ein kvinnurødd ljómar í hátalarunum og greiðir frá, um hvat vit síggja og eisini nakað um sjálva kappingina.
Landslagið har á leiðini er sera vakurt, stórar vínmarkir, høg fjøll og nógvur skógur. Hetta er jú november og flestu trøini eru um at missa bløðini, og standa við sínum gyltu, gulligu, reydligu, og reyðbrúnu heystarlitum og prýða líðirnar. Sera hugtakandi.

Tá vit eru komin um landagrensina inn í Slovenia, biður hon farvæl, tí hon skal fylgjast við øðrum bussi fram á leið. Men nú loypur fyrsta skriðan. Bussførarin hevur ikki ánilsi fyri hvar hann skal, og í bussinum eru fólk, sum skulu búgva á minst fimm ymiskum hotellum, og fólk flest vita ikki á hvørjum hotelli tey skulu búgva. Vit eru tó so mikið væl útbornir av føroyska talvforsetanum, at vit hava navnið á okkara hotelli, Hotell Bolfenk. At greiða hesa fløkju fer minst ein tími, men vit sita væl, og kappingin sjálv byrjar ikki fyrr enn í morgin so tað gongur nokk.

Tá vit endiliga hava fingið bussin aftur á rull, gongur ikki leingi til vit síggja býarskeltið av Maribor og undir liðini av tí, risa skeltir sum boða frá at talvkapping er í býnum, so nú eru vit skjótt frammi, halda vit. Men nei, tí har ein skriða er lopin er onnur væntandi.

Vit byrja at seta fólk av niðri í býnum, t.v.s. niðri á sløttum við tvey ella trý hotell, og síðani tekur hesin risa bussurin leiðina niðan eftir brattari fjallasíðu, á sera smølum vegum. Gamli Leirvíksvegurin ella vegurin til Skarvanesar høvdu blikna móti hesum sokallaða vegi, við tí eina serpentinara svinginum fyri, og øðrum eftir, vegir sum eg bert kenni frá Tour de France.

Vit damlaðu niðan brekkuna og serliga ein Kinakona var heilt elektrisk, helst uppvaksin á risastóra láglendinum har Yangtze áin rennur í havið. Við hvørt stopp, loypur hin elektriska út, men noyðist hvørja ferð inn aftur. Tá vit eru komin á "Toppin av Mount Everest" er endiliga skeltið við Hotell Bolfenk at síggja. Tá hava vit koyrt hesar 45 kilometrarnar uppá stívar tríggjar tímar. Vit fáa lykilin til okkara dupultkamar og løtu seinni verða vit bodnir til døgurða í matstovuni. Tað vísir seg at hetta er eitt frálíkt skihotell, og bert 300 metrar frá hotellinum er skilyft, sum førur okkum oman í býin har kappingin skal fara fram, í Sport Center Dras, ikki ólíkt einari føroyskari ítróttarhøll.



Vit eru spentir at síggja umstøðurnar har kappingin skal fara fram, so tá vit hava etið, fara vit við hvør sínum lyftkorti at royna skilyftina. Tað er ikki sørt at tað kitlar illa í búkinum, tá vit fara sveimandi millum himmal og jørð, og tora valla at hyggja niður, men fram kemur hann í hóvliga fer. Tá vit aftur hava fæst undir fóti, eru vit báðir feðgarnir samdir um, at hevði mamman verið við, hevði hon helst havt verið deyð av skrekk. Ikki tí, slíkar umstøður venist man skjótt við, og tað gjørdu vit eisini.

Vit verða innskrivaðir í øllum góðum, koma aftur til hús og fara tíðliga í song, fyrsta umfar er klokkan 15.00 dagin eftir. Pernas Agustin úr Argentina er fyrsti mótstøðumaður við svimlandi styrkitalinum 1796 í Elo-raiting. Janus er ikki á hesum lista. Hevur bert føroyskt styrkital uppá 1220.

Ilt er at sova í fremmandari song, og tað grettir ikki, at tú vaknar snimma, hvussu bleyt og heit songin annars er. Vit fáa okkum morgunmat og fara so at ganga okkum ein túr, fyri at gerast fortróligir við økið har vit skulu húsast næstu tvær vikurnar. Frálíkar umstøður í allar mátar, svimjihylur, sauna, kiosk, fótbóltsvøllur, spælirúmið við Pool-borðum og barr.
Einasta sum er at grenja um er, at internetsambandið á kamarinum er millum nakað og einki, hetta orsøka av at kamar okkara sum annars er frálíkt, liggur so óheppi fyri í húsinum, ovast uppi úti á einum kvisti. Gott samband er viðhvørt í móttøkuhølunum, eisini niðri í býnum har kappingin fer fram.

Á sama hotelli, sum vit búgva, er eisini delegatiónin úr Taivan, og har eru fleiri dreingir um aldur við Janus, og hendan dagin er óført bóltspæl á plenuni. Janus verður boðin at spæla við, og hetta kemur væl við, tí drongur frá piltaliðnum hjá KÍ hevur góðan bóltførleika og smekkar bóltin í kassan ferð aftaná ferð. Gott fyri sjálvsálitið, nú so stór avbjóðing stendur fyri framman. Janus kemur tó skjótt niður á jørðina, hann tapir fyrsta talvdystin móti Pernas greitt. Tað var ikki annað væntandi.




Áðrenn talvið móti Pernas Agustin sum skuldi byrja klokkan 15 00 skuldi kappingin setast við hátíðarhaldið. Vit møttu upp í góðari tíð, og gott tað sama. Her var ein trokan og rokan í fjøruni, nakað sum á ólavsøku, tó ongar ballónir og fullir menn tað vit sóu. Lúðraljóð og onkur fanfara dundraði út úr hátalarunum og síðani komu presidentar og borgarstjórar kropp á kroppi upp at halda røðu. Ein forskrektur tolkur í lærstuttum kjóla roydni sum frægast at umseta til enska tungu, men tað var skikkiliga skjótt at 2000 av teimum 3000 sum inni vóru, gorraðu so illa í holið á hvørjum øðrum, at har hoyrdist ikki mannamál og teir báðir lítlu hátalararnir sum settir vóru upp til høvið, einki formáddu sær meira.

Triði ella fimti í røðini av røðarum var annars aðalskrivarin í FIDE, General Secretary Mr. Ignatius LEONG, og hann segði millum annað, so frætt hoyrdi eg hóast alt, at hendan heimsmeistara kappingin nú var vorðin so stór, at hetta var blivið stórsta talvkapping í heiminum, størri enn talv OL, sum annars inntil nú hevur verið størst. Tað luttaka uml. 1600 telvarar umframt eitt ótal av hjálparfólki, dómarum, fjølmiðlafólki, fólk sum kunna og selja. Eisini er hópur av mammum og pápum, ommum og abbum, og øðrum. Minst 3000 tilsaman. Hann segði víðari at týdningarmiklasta málið hjá FIDE í hesum tíðum er at fáa talv inn í skúlarnar og mong lond kring heimin hava longu tikið hetta til sín. Orsaka av hesum er væntandi at hendan kapping fer at vaksa uppaftur meira. FIDE hevði tí gjørt av, at frá 2016 fara øll børnini frá U8 til U18 ikki at kappast saman í somu kapping longur, men skulu býtast upp, soleiðis at U8-U10-U12 vera í einari kapping og U14-U16-U18 í einari.

Næstu HM kappingar av hesum slag vera annars í Sameindu Arabisku Emiratunum 2013 og í Suðurafrika 2014, so tað er bara at halda seg framat. At fáa talv inn í skúlarnar í Føroyum hevur ikki verið nógv at hoyrt um tíanverri, men herfyri skrivaði sera farvuríki og talváhugaði Tobbi á fjesbókini í samband við valstríði til býráðið í Runavík, at hann var fyri, at fáa talv inn í skúlarnar. Hvussu gekk við valinum, veit eg ikki í skrivandi løtu.

Mynd frá www.dsu.dk Donsku luttakararnir við Jussupow



Tá inferniski larmurin var upp á sítt mesta, trein breiður og brúnasíður maður av sibiriskari ætt upp á pallin, hetta var "the Chief Arbiter" himself, ikki heilt ólíkur einum av Klitschko brøðrunum, og kunngjørdi við torurødd, at børnini skuldu finna sítt pláss og øll onnur skuldu sleppa sær út við ein vissan fart. Hetta segði hann so sannførandi, at nú kom ikki smávegis røringur í fjøldina. Hvat skal man annars vænta, tá ein fær valið ímillum pest ella kolera. Eg fekk í skundi tikið eina mynd av soninum og Pernas, og so var at halda á dyr. Trokanin var somikið nógv um grindina at tað skal ikki undra meg um átta konur vóru traðkaðar til deyðis, men hetta seinasta havi eg tó einki frætt um.

Restina av túrinum er rímiliga skjótt sagdur, tí vit 1500 sum komin vóru við at stuðla okkara børnum og at fylgja við kappingini annars, fingu sum vátan vøttin dagin eftir, tá næsta umfarið skuldi byrja. Janus møtti annars Slovena Pridigar Lovro við ELO 1562 og fekk ein flottan javnleik. Vit vóru ikki longur ongul í reyv, vóru komnir á listan, so í so máta ein fín byrjan uppá kappingina.
Men áðrenn umfarið skuldi byrja, møta vit upp í góðari tíð, dyrnar til leikhøllina vera opnaðar hálvan tíma áðrenn fyrsti leikur skal flytast. Eg pussi linsuna á fototólinum væl, ætli at kunna fólki í Føroyum um gongdina og senda onkra myndina til Talvtos á FB. Kanska møtir Janus komandi verðinsmeistara, slíkt er stuttligt at eiga mynd av. Vit stilla okkum í kø saman við mongum øðrum fylgjarum. Har eru pápar og mammur, ommur og abbar, venjarar og gestir, Head of Delegation, umframt allar telvararnar sjálvsagt.
Vit uppliva at frammi við perluportrið, er ein øgilig málageipan, ikki frítt at fólk eru ørkymlaði, summi vónbrotin og onnur hava hug at taka nevarnar í nýtslu, sum vit nærkast síggja vit skilið. Ein herur av vaktum skulu skilja bukkarnar frá lombunum, bert børnini, sum skulu telva sleppa inn og eingin annar, og t.v.s. eingin.

Eitt stórt vónbrot fyri meg, tað sum vit høvdu frætt og sum hevur verið vanligt í øllum slíkum stórum kappingum inntil denna dag, er at fyrstu uml. 10 minuttirnir kunnu vit, sum ikki telva koma inn, taka eina mynd meðan kamphanarnir taka í hondina á hvør øðrum, síggja fyrstu tveir leikirnar og síðani út.

Síðani, tá ein tími er farin av talvinum kann Head of Delegation koma inn og fylgja við. Hetta hevði eg sjálvandi væntað, og glett meg til, men soleiðis skuldi ikki vera. Bara ÚÚÚÚTTTTTTTTT.

Triðja umfar møtir Janus Ghersinich Enrico úr Croatia ELO 1641 og tapir, er tó í hesum talvinum í slíkari støðu, at hevði bispurin verið fluttur á annað stað í leiki 32 enn hann bleiv, hevði hann vunnið eina finnu, og komið í sera góða álopsstøðu. Men líka við og næstan, slær ongan seymin fastan.

Fjórða umfarið situr skoti hinumegin borði, Colin Howie Elo 1426. Janus tapir. Meðan talvið fer fram geri eg av at fara ein túr við bussinum inn í býin. Eg hugsi at skilagott hevði verið at fingið fatur á ódýrum guitarstreingjum, og tá eg havi spurt ekspidientin, hvussu nógvar pakkar hann eigur, er hann so fyrndar glaður og smílist um alt fimmoyra. Hann veit bara ikki av at tað eri eg sum havi gjørt størsta kuppi.

Tá eg eri á veg heim aftur og standi og bíði eftir bussinum komi eg á tal við eina fína frúu úr New York, tað vísur seg at dóttur hennara eisini telvar í bólkinum U12, fyri gentur tó. Vit tosa um ymiskt og tá eg sigi at eg komið úr Føroyum, (eg eri fyrireikaður uppá, at hon ikki hevði ánilsi av, hvar Føroyar er) sigur hon: OOOHHH I have been dreaming af coming to the Faroes for á long time. Eg gjørdist sera bilsin, og tá eg spyrji um orsøkina, sigur hon mær, at hon er von at koma á matstovu á Manhattan (havi tíverri gloymt navnið) og har bílegði hon altíð føroyskan royktan laks, og hetta var, eftir hennara tykki, besti fiskur í heiminum. Stikk denn.

Fimta og sætta umfar eru sama dag, so hetta verður ein strævin dagur, men síðani kemur ein frídagur miðskeiðis í kappingini. Kappingin er nevniliga skipað á tann hátt, at tað eru ellivu umfør í ellivu dagar, eitt dupult umfar og ein frídagur. Klokkan tíggju møtir Janus Chang Jeong Hoon úr Koera, og vinnur talvið. Sera stór frøi á feðgunum, pápin er av teirri fatan, at um drongurin so einki annað stig fær, so hevur hendan kappingin ikki verið til fánýtis. Hetta skal sjálvandi feirast, og tað ordiliga eisini. Tí verður avgjørt at halda inn aftur í býin, og byrja leitanina eftir hinum gylta M’inum. Og mín sann hann í leitar hann finnur, tí McDonnalds er sjálvandi eisini í Maribor. Vit fara inn og keypa Big Mac Menu og heila svínaríið. Plankin verður gingin heilt út.




Sætta umfar er klokkan 17. Janus møtir Gombac Matevz úr Slovenia við Elo 1497 og Janus tapir. Um tað var Mac’urin sum lá av tungt í búkinum, skal eg ikki kunna siga, men vit eru sera væl nøgdir við dagin. Í morgin er frídagur, og vit hava meldað okkum til eina útferð, vit skulu vitja eina av størstu helluskipanum í heiminum The Postojana Cave, og síðani vitja gamla býarpartin í høvuðsstaðnum Ljubljana.

Tá frídagur er, er kanska skilabest at sova leingi og liggja á løtu síðuni sum longst, men nei nei. Vit eru snimma á fótum, longu klokkan sjey, og sita í svevibananum áðrenn klokkan er vorðin átta. Síðani í bussi víðari. Eg veit ikki um tað er trupult at koyra fólk í bussi, men enn einaferð kláraðu fyrireikararnir at fløkja hetta soleiðis saman, at vit koyrdu í ein ring, fingu fólk uppí, sum ikki átti, settu fólk av, sum skuldi vera við og annað slíkt, soleiðis at fyrsti tímin av ferðini aftur var tað reina Sirius.

Á setrinum framman fyri okkum sat ein sera harðmæltur asiati, og tað kundi gott ljóða sum um hann fortaldi fúlar krønikur ella okkurt tílíkt, tí konurnar sum sótu rundan um hann flentu so hjartaliga. Men vit skiltu sjálvandi ikki eitt kvekk, so hann fekk beinanvegin eyknavnið: Gorrus.

Ikki frítt, at vit vóru eitt sindur troyttir at hoyra mannin sum frá leið. Vit hava tó ein langan og spennandi dag fyri framman: The Postojna cave er ein av kendastu hellu skipanum í heiminum og størsta ferðamálið í Slovenia. Stórsligin hola við nógvum ymiskum rúmum við sera vøkrum skapið, og nógvum litspælið. Eitt margfeldi av ymiskum súlum og stólpum og glerpípu og spaghetti líknandi figurum hangandi undan loftinum. Alt skapt av vatntrýsti umgjørt til kálkstein gjøgnum milliónir av árum. Ein partur av ferðini var gjørdur í serligum toki og ein partur til gongu eftir smølum rásum og brúgvum, alt saman við enskt talandi ferðaleiðara, sum greiddi livandi frá. Túrurin í hellinum vardi í smáar tveir tímar. Vit vóru imponeraðir.



Tá vit vóru útaftur komnir var døgurði á skránni, tað vistu vit. Vit vóru heldur seinir út úr hellinum, og tá vit komu út var einki menniskja at síggja, og vit vóru satt at siga komnir í trongstøðu. Vit vistu hvørki út ella inn, gingu yvir til bussin, men einki fólk at síggja. Tá vit soleiðis ganga og  eru vornir eitt sindur mótleysir, hoyra vit eitt kent Gorr, og mín sann kemur Gorrus stunandi, og hann vist beinanvegin at siga okkum vegin. Gorrus sætt at siga bjargaði okkum dagin. Døgurðin skuldi etast í sera stásiligum hølum beint uttanfyri hellumunnan. Fínur dúkur og krystall, stórt hølið við rundum borðum við flottum ljósakrúnum hangandi undan loftinum. Vit vóru í seinra lagi, mest sum øll høvdu funnið ein sess, so vit gingu eitt bil og leitaðu eftir einum borði har tveir sessir vóru. Heilt innarliga funnu vit so eitt borð, og hetta vísti seg at vera ikki hissini borð. Tí eg kom at sita undir liðini av Russiska Head of Delegation, hann vísti seg at vera ein fínur borðharri. Eisini sat maður úr Kenja undir liðini av Janus, og tað var heilt týðuligt, at hann ikki var vanur við slíkar fínar, snobbaligar og nærmast kongaligar manerir sum hetta, m.a. dugdi hann ikki at halda á gaffil og knívi. Fittur og blídligur maður annars.

Russin (sum eg tíanverri ikki fekk navni á, men sum heilt týðiliga hevði veri til mong OL og nógv meistaraheiti) var sera prátingarsamur, og millum annað spurdi eg hann um hetta, at eingin slapp inn, ímeðan børnini telvaðu, heldur ikki fyrstu uml. 10 minuttirnar. Hann hevði ongantíð uppliva hetta fyrr, og var púra samdur við mær um at hetta ikki var nóg gott, serliga fyri teir yngstu telvararnar. Tað hevði verið stór ónøgd við hetta á Tekniska fundinum, men fyrireikararnir høvdu einki gjørt við trupulleikan.

Síðani gekk leiðin til høvuðsstaðin Ljubljana við bussi, tað løgna hendi at eingir trupulleikar vóru, og bussurin koyrdi til tíðina. Tað er sera hugnaligt í gamla býarpartinum í Ljubljana, og ferðaleiðarin, sum vit fingu at vísa okkum runt, var ikki sørt skemtingarsamur, so hetta gjørdist ein hugnaligur gongutúrur, eftir smølu brúgvagróts løgdu gøtunum, og eftir fleiri av brúgvunum yvir Ljubljanitza sum stóra áin eitur, sum rennur mitt ígjøgnum býin. Har eru mong stásilig hús, flottar borgir og vøkur torg, skrýdd við standmyndum og list. Tað er týðuligt at býurin hevur hýst Kongum og valdshavarum, og hevur verið ein týdningarmikil handilsbýur langt aftur í tíðina. Eisini er býurin so vakur og áhugaverdur, tí teir vóru so hepnir at gamli býarparturin ongantíð var bumbaður undir seinra heimsbardaga.

Vit vóru heima aftur, tá klokkan var farin av átta á kvøldi, fullir av nýggjum upplivingum. Eisini gott at fáa ein frídag og tøma høvdi fyri talvkombinatiónir, og byrja av nýggjum uppá seinru hálvu av kappingini við nýggjum kreftum.

Í sjeynda umfarið møtir Janus Ali Faisal úr Sameindu Arabisku Emiratunum ELO 1536 Janus hevur hvíta fólki, men tapir talvið. Men kanska er møguleiki at hitta hendan Ali aftur á heimligari grund, t.v.s. í Sameindu Arabisku Emiratunum, tí hendan heimsmeistara kapping verður í 2013 fyriskipað har. Tað verður munandi lýggjari enn her í Slovenia, har hitin liggur beint omanfyri frostmarkið um dagarnar. Meðan har er helst neyðugt við stuttum brókum og sólkremi. Kanska onkur annar føroyskur telvari sleppur at royna seg næstu ferð, nú vit hava sett hol á.

Í áttanda umfari møtir hann aftur einum frá Korea. Jung Ivan Yijoon. Janus telvar við svørtum og hóast Korea er eitt munandi størri land enn Føroyar, og teir duga betur at gera bilar enn vit, so hava teir ikki frægari telvarar, tí eins og við hinum koreanaranum sum Janus møtti í 5. umfari so gongur ikki mætari enn at Janus  vinnur talvið. Stór frøði á feðgunum, bara lort at ikki fleiri dreingir úr Korea eru eftir at møta, tí teir klára vit, tað vita vit nú.



Níggjunda umfar. Globevnik Miha Elo 1451 úr Slovenia, aftur hesaferð við svarta fólkinum. Janus tapir talvið. Slovenin blitzar Janus niður, ikki tí, teir spæla Italienskt, sum skuldi verið OK og koma út í Giuoco Pianissimo variantin, sum Janus hevði fyrireikað seg uppá, men Slovenin kendi hann bara uppaftur betur, tí tá talvið er liðugt, hevði slovenin 1:35 á klokkuni og hevði vunnið talvið.

Vit eru nú komnir so langt í kappingini at bert tvey umfør eru eftir og vit skjótt fara at venda nøsini heim aftur móti klettinum. Og gott tað sama, tí nærum tvær vikur á hotelli er nú farið at merkjast á kroppinum, og heimlongsulin farin so smátt at gera um seg. Vit eru við at vera troyttir av at fáa døgurða tvær ferðir hvønn dag. Tað vil siga snitzel og chips og ketsjupp á døgurða og á kvøldið hvønn dag í fjúrtan dagar, hóast snitzlar smakka væl og at nokk er til, kann vera keðiligt í longdini. Ein herur av tænandi andum við stein andlitum, fýkur alla tíðina um matstovuna, og tað grettir ikki, at reisur tú teg upp, at fáa tær meiri vatn í glasið til dømis, so er tallerkurin burtur tá tú kemur aftur, hóast bert var hálvetið. So har er einki annað at gera enn at fáa sær nýggjan tallerk og fylla snitzlar uppá aftur. Eisini liggur tað í bakhøvdinum, at í hjallinum heima, hanga røstu síðurnar á rað, akkurát passaligar at koyra í ovnin. So tað er einki at skammast yvir, at vit gleða okkum at koma heim.



Tíggjunda og næst seinasta umfar, er aftur ímóti einum Slovena. Hesaferð Bajo Tin og Janus hevur hvíta fólki. Janus telvar sítt besta talv í kappingini og vinnur sannførandi. Teir telva Italsku byrjanina og Janus velur Greco Møller álopið, og rímiliga skjótt far hann takið á mótstøðumanninum og vinnur.  Trý og eitt hálv stig. Vit skemta við, at hann seinastu tríggjar NM kappingarnar á rað, hevur enda við at fingið 3,5 stig av 6. Tað vísur seg at hann ikki fer til nakra kapping, uttan at enda við hesum stigatali. Vit áttu kanska at funni onkra kapping við fýra umførum, tí tá hevði 3,5 stig helst verið nokk til at staði ovarliga á pallinum. Sjálvur talvgudurin Mr. Kasparov kemur at handa virðislønir eftir seinasta umfar í morgin, og skemtiligt hevði verið at deilt pall við hann. Hvørt heilt stig skal feirast, so snitsilin á hotellinum verður umlopin. Pizza og ís.

Eg prátaði við onkran av Norsku leiðarunum og spurdi, hví eingir norðmenn luttóku í teimum yngstu aldursbólkunum U8 og U10, teir hava annars 22 leikarar við, og ferðalagið telur um 40, harav 5 eru við frá talvsambandinum sum venjarar, og sum einki annað hava at gera enn at fyrireika telvararnar. Hetta var av ítróttarpolitiskum ávum var sagt, tað var mett, at hetta var ikki ein kapping, sum egnaði seg væl til smærri børn. Kappingin var ov long og strævin og leggur ov nógv trýst á børnini. Teir høvdu bert einaferð gjørt eitt undantak, tá Arian Tari, ein sum vit kenna frá NM, var sendur til Vietnam fyri nøkrum árum síðan í U10. Í bólkinum hjá Janus U12, sloppið bert børn sum vóru fødd ár 2000 t.v.s. seinra árið í bólkinum. Janus er frá 2001 og er sostatt við teirra politikki ov ungur at taka lut. Hetta setur sjálvandi nakrar tankar ígongd.

Íslendska ferðalagið er heldur ikki stórt, teir hava eisini bert ein telvara við. Tað er Vignir Vatnar Seffansson, sum er nýggju ár og luttekur í U10. Pápin og Abbin eru við, og Skúlastjórin á íslendska talvskúlanum, altso professionellur talvvenjari, GM (Stórmeistari í talvi) Helgi Ólafsson, sum einki annað hevur at hugsa um, enn at fyrireika Vignir, er við sum venjari. Hetta gera teir eisini fleiri tímar um dagin. Hetta er annars fjórðu ferð at Vignir er uttanlands og telvar í ár. Vit møttust til NM í Finnlandi í vár, í februar. Tað er ein stutt kapping, seks umfør í tríggjar dagar. Síðani hevur hann verið í Bulgaria, í Prag til Europameistara heiti, og so nú. Allar langar kappingar sum hendan. So tað er so ymiskt sum man sær uppá hendan spurningin.

Okkara fyrireikan á staðnum er ikki so metodisk og djúptøkin, mín talvvitan er ógvuliga avmarka. Vit hava ongan venjara við, vit duga ikki nakað serligt at gera okkum til reiðar at møta næsta mótstøðumanninum. Vit vita at Tummas Martin Sólsker og serliga Petur Hans Poulsen hava vant dreingin væl í mong ár, og tað líta vit á. OK vit hava sjálvandi Chess Base og Fritz og royna at googla mótstøðumannin frammanundan. Fyrireikingin er fótbóltur á plenuni sum Janus elskar, ein muss á kjálkan og so peptalk sum: Ger nú títt besta og ver nú so raskur góði.




Annars so hevur GM Helgi Ólafsson verið sera fittur við okkum, teir dagarnar har Janus hevur verið liðugur at telva áðrenn Vignir. Uml. aðruhvørja ferð, hevur hann brúkt tíggju minuttir upp á taka talvini ígjøgnum saman við Janusi, so hetta hevur verið sera gott fyri okkum. Eg ivist ikki í, at høvdu vit á slíkum túri sum hesum, havt meiri stuðul til fyrireiking og gjøgnumgongd, høvdu stigini verðið fleiri. Hetta hava vit lært á hesum túrinum, møguleikarnir við ICC og Skype eiga til eina aðru ferð at vera tiknir í brúk, um ikki ein venjari er við, sum sjálvandi er tað besta.



Seinasta umfar, vónandi verður tað ikki ov strævið, og eitt líkinda úrslit. Janus skal møta Klemen Zupancic úr Slovenia við Elo 1559. Janus fær eitt fínt seinasta úrslit, tí eftir 11 leikir bjóðar Slovenin javnt, og Janus tekur av. Teir telva annars Samic variantin í Nimzoindiskum. Tað vísur seg tó í analysuni, at Janus hevði teirri betri støðuna, tó uttan avgerandi fyrimun, og kundi gott hildið á at telva. Fýra stig, tríggjar sigrar, tveir javnleikir og seks tap, av ellivu møguligum er bara gott, og vit hava lært eina rúgvu.

Nú er at fáa kuffertini pakka, tá vit eru feðgar á ferð, er ordanin ikki hin sama, sum tá mamman er í nánd, so klæðir og pakkanelikar liggja sløddir um tað heila hús, so tað er einki hugaligt at fara undir, men tað skal gerast. Vit grýta sum frægast niður í kuffertini, tí í kvøld er endahátíð og allir telvararnir á átta fremstu plássunum í øllum bólkum fáa viðurkenning av einum hvørjum slag.

Tað er sjáldan serliga hugaligt at hoyra uppá ymisku høgu harrarnir, sum skulu halda røðu, takka og blæsa seg sjálvan upp, upp á ymsar mátar. Tað vit gleða okkum mest til er at Garry Kasparov besti telvarin nakrantíð, er á staðnum, og kanska kunnu vit sóla okkum í geni'num. Kanska hann smittar. Endahátíðin vardi í smáar tveir tímar, har var umframt langar talur, sami forskrekti tolkur, hesaferð í eitt knælongum kjóla. Dunkandi diskurútmur og hipphopp, stórt harmonikuorkestur, og sjálvandi allar handanar av steypum og øðrum virðislønum.

Tey londini sum eru fremst innan talvítróttina eru USA India og Russland. Mest spennandi løtan fyri okkum var, tá alt var um at verða liðugt, og Janus hevði sett sær fyri at fáa ein autograf frá talvkonginum sjálvum Mr. Kasparov. Væl útgjørdur við penni og pappíri var hann komin alla tað longu leiðina niðan móti pallinum, bert fáar metrar frá málinum, tá ikki færri enn tríggir alvápnaðir vaktir loypa til og steðga dreinginum við missiónini. Sera spell og ikki serliga pent gjørt. Kasparov sýntist á pallinum sjálvur at vera sera lættur í huga, skemtandi og væl upplagdur, hann hevði avgjørt sjálvur einki havt ímóti at grifla nakrar undirskriftir, vóru vit samdir um.

www.chessbase.com




Heimtúrurin verður strævin, vit skulu ómenniskialiga tíðliga upp. Longu klokkan 5.30 kemur bussurin og heintar okkum á hotellinum, og vit gleða okkum ikki til kronglutu fjallagøtuna, sum vit komu eftir, eina ferð afturat, hesa ferð undan brekkuni sum helst er 1000 ferð verri enn tá vit komu.

Vit skulu í trý flogfør. Graz til Vien. Vien til Keypmannahavnar, og so Keypmannahavn-Vágar. So í bili til Klaksvíkar í kava. Klokkan líður móti nátt tá vit endiliga kunnu kava í okkara egnu heitu song. Men tá verða vit eisini nakað brúktir. Ein fínur túrur er komin at enda. Janus sigur seg fegin vilja gjørt túrin umaftur, men tað er eisini sjón fyri søgn, at støði á telvingini er øgiligt. Vit sovna væl nøgdir og vóna bara ikki at mamman sum stakast heima, hevur ætla sær at gera snitzlar til døgurða í morgin, tí so leypa vit báðir um Borg.

Hans Hjalti Skaale